# Vilja hava fleiri at svara

**Enn hava bert triðingurin av teimum spurdu svarað spurnarkanningini, sum send varð valevnum til kommunuvalið. Fyrireikararnir vilja fegin hava fleiri svar**

SPURNARKANNING
*Eirikur Lindenskov*

Fyri trimum vikum síðan fingu øll tey, sum vóru uppstillað til kommunuvalið í 2000, eitt spurnablað í postinum. Kanningin skal lýsa, hvørji gjørdust valevni, og hvørjar hugsanir hesi hava um kommunupolitikk. Higartil hava 30% av teimum 951 valevnunum svarað.

– Tilfarið er sera áhugavert. Vit vilja fegin takka øllum, sum hava sent okkum svar. Tey hava gjørt sær ómak at geva eina holla lýsing av sínari støðu, eisini við egnum orðum. Tilfarið fer at vera eitt gott grundarlag til lýsingar av føroyskum kommunupolitikki, sigur Beinta í Jákupsstovu, sum tendur fyri kanningini

Hon heldur kortini, at gott hevði verið, um fleiri høvdu svarað. Tey eru nú farin undir telduarbeiðið, og vildu helst havt øll svarbrøvini **innan 1. juli.**

– Bert fá brøv eru komin aftur, tí adressan hevur verið skeiv, fólk eru flutt, ella menn eru til skips. Um allar Føroyar liggja spurnabrøv, sum vit sera fegin vilja hava aftur, útfylt, sigur hon.

Talvan vísir, hvussu stórur partur av valevnunum frá 2000, sum hava svarað. Klaksvíkingar og havnarfólk liggja á odda í so máta, men eisini hagani vilja vit fegin hava fleiri svar.

Um tygum hava spurningar viðvíkjandi spurnablaðnum ella kanningini, vendið tygum til Beintu í Jákupsstovu, Høgskolen i Molde, tlf 0047 712 14208, ella sendi teldupost til Beinta@himolde.no

| Limir í bygdaráðnum/býráðnum | Uppstillaði í 2000 | Svarbrøv 15. juni 04 | Prosent svar |
|---|---|---|---|
| 3 | 87 | 19 | 21,8 |
| 5 | 255 | 74 | 29,0 |
| 7 | 347 | 98 | 28,2 |
| 9 | 119 | 30 | 25,2 |
| 11 (Klaksvík) | 57 | 24 | 42,1 |
| 13 (Tórshavn) | 86 | 33 | 38,4 |


## Fakliga spennandi avbjóðingar bíða nýggjum fulltrúa

Ert tú royndur løgfrøðingur, sum hevur hug at spesialisera teg og arbeiða konsentrerað fakliga?

Ella ert tú ungur løgfrøðingur, sum ynskir góða barlast á yrkisleiðini? Og hevur tú samstundis áhuga fyri starvsfólkamálum?

Um so er, eigur tú at søkja tær henda møguleikan at arbeiða við fjøltáttaðum uppgávum innan starvsøkið, ið fevnir um starvsfólkamál.

**Sum dømi um uppgávur í starvinum kunnu nevnast:**

- Starvsfólkarættarlig viðurskifti, her uppi í lóggávuarbeiði, sáttmálatulking og rættarmál
- Sáttmálasamráðingar
- Málsviðgerð av flokkingarmálum
- Starvsfólkapolitiskir spurningar

Tú kemur at starvast á einum livandi øki og til tíðir í rokaligum umhvørvi, sum mennist og broytist alla tíðina. Eisini fært tú nógv samband við stovnar, fakfeløg og advokatar.

Starvið er avbjóðandi, og tað hevur týdning, at tú ert fyrikomandi, smidligur og støðufastur.

Vit leggja dent á, at Lønardeildin er vælvirkandi og professionel. Samstundis sum umheimurin fær eina góða tænastu frá okkum, skal hann fata okkum sum fakliga dugnalig. Tí bjóða vit tær upplæring og góðar skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar í einum góðum arbeiðsumhvørvi við góðum samstarvsfelagum.

Hevur tú løgfrøðiliga kandidatútbúgving, eru setanartreytirnar eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast hjá Thomas Magnussen, stjóra, á telefon 35 22 00.

Vit skulu hava tína umsókn innan 5. juli 2004, kl. 12.00. Hon skal sendast til Fíggjarmálaráðið, Lønardeildina, Postboks 2039, 165 Argir.

Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur ábyrgd av landsins arbeiðsgevaraheimildum, ið viðvíkja lønum og setanartreytum.

**Høvuðsuppgávurnar hjá lønardeildini eru tí:**

- at samráðast við fakfeløg um sáttmálar og avtalur fyri størv hjá landinum
- at umsita tænastumannalóggávuna
- at flokka størv og at góðkenna individuellar treytir
- at ráðgeva hinum ráðunum í arbeiðsrættarligum og setanarrættarligum spurningum

**Harumframt umsitur Lønardeildin eisini:**

- Góðkenning av leigusáttmálum, tá ið landið leigar frá øðrum
- Tann part av kommunustýrislógini, sum snýr seg um góðkenningar samb. § 5, stk. 5 av kommunalum sáttmálum og avtalum um lønar- og setanarviðurskifti v.m.

FØROYA LANDSSTÝRI
Fíggjarmálaráðið

SANSIR 355 355






+298 808080 www.tele.fo
FØROYA TELE








# Vilt tú verða ein av okkum

**So átti tú at gjørt sum vit. Vit hava tikið eina avbjóðandi og fjølbroytta útbúgving á Tryggingarfelagnum Føroyum**

Útbúgvingin er ein tvey ára fíggjarútbúgving, sum fevnir um ein praktiskan og teoretiskan part. Tú fært hollan kunnleika um tryggingar og lærir m.a. um løgfrøðina aftan fyri tær. Tú arbeiðir eitt skifti í senn á ymiskum tryggingarøkjum. Á henda hátt fært tú innlit í okkara fjøltáttaða arbeiði í eini stórari fyritøku við yvir 100 starvsfólkum.

Tann teoretiska førleikan fært tú við at fylgja undirvísing og gera uppgávur við jøvnum millumbilum, eins og útbúgvingin gevur tær góðar møguleikar fyri framhaldandi tryggingarútbúgving til eitt nú tryggingarráðgeva ella skaðaviðgera.

Vilt tú vita meira, so ring til ein av okkara fyri at vita, hvat vit halda um útbúgvingina og Tryggingarfelagið Føroyar sum lærupláss.

Á heimasíðuni www.trygging.fo hevur tú møguleika at fáa eina nærri lýsing av felagnum og okkara virksemi. Tú ert eisini vælkomin at ringja til Jónsvein Simonsen, deildarstjóra, á tel 345551 ella fartel 213551.

Tað er ein treyt, at tú hevur studentsprógv, HF ella HH. Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. juni. Avrit av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

**Arnhold Olsen, 22 ár, Klaksvík:**

"Mær dámar sera væl at arbeiða á Tryggingini. Útbúgvingin hevur verið spennandi og krevjandi. Tryggingarfelagið Føroyar er eitt stórt og fjøltáttað felag, og tí eru møguleikarnir og avbjóðingarnar nógvar. Í lærutíðarskeiðinum havi eg starvast á fleiri ymiskum deildum, og tí havi eg fingið eina breiða og góða tryggingarvitan. Arnhold Olsen, 22 ár, Klaksvík."

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · 110 Tórshavn · Tel 345600 · Fax 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

Tryggingarfelagið Føroyar er eitt partafelag við høvuðsdeild í Havn og fimm deildum kring landið. 123 fólk starvast í Tryggingarfelagnum Føroyum. Les meira um okkum á www.trygging.fo

SANSIR TEL 355 355